## Jón Rói á eykaliðnum

Jón Rói Jacobsen var ikki við á superligaliðnum hjá AaB, sum um vikuskiftið vann ímóti FC Nordsjælland. Jón Rói spældi hinvegin við eykaliðnum hjá AaB, sum leygardagin spældi ímóti FC Midtjylland. AaB vann greiðan 4-1 sigur, og Jón Rói legði upp til eitt av málunum. Jón Rói hevur ikki verið nógv við á besta liðnum í ár, men hann er ein av fyrstu eykaspælarunum, sum verða innkallaðir til hópin, um brúk er fyri tí.



## AaB liggur væl fyri

Eftir at FCK í gjár tapti fyri FC Midtjyllandi, liggur AaB heilt væl fyri í toppinum í superliguni. Eftir dystirnar um vikuskiftið, er AaB seks stig frammanfyri FCK, men tað eru framvegis 10 dystir eftir at spæla, áðrenn danski meistarin verður funnin. AaB spældi um vikuskiftið ímóti FC Nordsjælland og vann. FCK tapti 2-0 fyri FC Midjyllandi í Parkini.

# Oddalið uttan venjara

**Tað gongur striltið hjá AaB at finna avloysaran fyri Erik Hamrén, sum í summar skiftir til norska Rosenborg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við verandi oddasessinum í donsku SAS-liguni í mentu er eingin ónøgd at hóma í AaB um avrikið hjá Erik Hamrén. Munurin niður til FCK er nú øktur til seks stig, og í Aalborg hóma tey nú av álvara fyrsta meistaraheitið síðani 1999. Sum eitt kuriosum kann nevnast, at mest týðandi spælarin á AaB-liðnum ta ferðina var Ståle Solbakken, sum í dag venur júst FCK.

Tað stóð tó longu í heyst greitt, at Hamrén eftir hetta kappingarárið fer til norska Rosenborg, men enn hevur AaB ikki gjørt greitt, hvør skal avloysa væl lýdda svian.

- Trupulleikin er, at eingin venjari er tøkur í løtuni. Og sum heild er fíggjarstøðan í ymsu feløgunum somikið góð, at tað kostar heilt nógv, um ein venjari skal keypast úr sínum sáttmála, sigur ítróttarstjórin í AaB, Lynge Jacobsen, við Ekstra-Bladet.

- Hevði tú spurt meg fyri nøkrum mánaðum síðani, um vit høvdu eina loysn um miðjan apríl, so hevði eg uttan iva svarað ja. Men tey nøvnini, sum vit hava arbeitt við, eru so ikki komin nakran veg kortini, sigur Lynge Jacobsen.

Í donskum miðlum hevur annars verið dúgliga gitt, hvør nýggi venjarin hjá AaB verður. Eitt nú hava Morten Wieghorst og Kent Nielsen fleiri ferðir nevndir, men enn hava teir so sáttmála við ávíkavist FC Nordsjælland og AC Horsens.



*Erik Hamrén hevur alla orsøk til at fegnast í hesum døgum. Lið hansara er fremst í donskum fótbólti, og sjálvur hevur venjarin fingið ein góðan sáttmála við norska Rosenborg. Verri gongst tó hjá AaB at finna avloysaran hjá svianum*
*Mynd: Polfoto*

# Flogbóltsdeildin hjá TB vann næstan alt



*Ikki færri enn seks av átta møguligum FM-heitum í flogbólti endaðu í ár hjá TB*

**Tað hevur gingið væl hjá flogbóltsdeildini hjá TB í ár og deildin hevur vunnið 6 av 8 møguligum meistaraheitum**

FLOGBÓLTUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

TB hevur klárað seg væl í flogbólti í ár. Nærum alt, ið er at vinna, hevur flogbóltsdeildin hjá TB vunnið, nevniliga 6 av 8 møguligum heitum.

Meistarar hjá TB eru gentur 12 ár og gentur 14 ár og kvinnu unglingar. Í meistaradeildini eru kvinnurnar nummar 4.

Hjá dreingjunum eru meistaraheitini eisini fleiri, nevniliga hjá dreingjum 10 ár, dreingjum 12 ár og dreingjum 14 ár og so er tað eisini 2. deild menn.

Harvið eru 6 av 8 møguligum flogbóltssteypum endað á Tvøroyri í ár, og hetta var orsøk til hugnaløtu og myndatøku í Trongisvági í fríggjakvøldið, har leikarar, venjarar, og tey, ið eru um, savnaðust.

Nevnast kann, at tað í ár eru 25 ár síðani, at TB Flogbóltur fekk sítt fyrsta heiðursmerki, og vóru tað tá kvinnurnar, ið vunnu seg úr 3. deild, og upp í 2. deild.